## Virðið farið upp um 300 mió kr

Kursurin á partabrøvunum hjá Atlantic Petroleum tykist støðugt at vaksa. Seinastu tvær vikurnar enntá so nógv, at kursurin nú er farin upp um tey 400. Tað vil við øðrum orðum siga, at tey, sum upprunaliga vóru við til at stovna felagið, nú hava møguleika at fáa íløguna ferfalt aftur. Og eisini hjá teimum, sum teknaðu partapening við seinastu hækkanina, er talan um munagóða øking í virðinum. Tekningarkursurin var tá 265, og við verandi 406,5 er talan um eitt avkast upp á góð 53%.

Prísurin á partabrævinum hevur annars leingi ligið um tey 390, men seinastu tvær vikurnar hevur nakað av aktiviteti verið, og hetta hevur trýst prísin enn longur upp.

Samlaða marknaðarvirðið á partabrøvunum í føroyska oljufelagnum er nú góðar 300 mió kr.




*Kursvirðið á partabrøvunum hjá Atlantic Petroleum, síðani felagið í juni varð skrásett á virðisbrævamarknaðinum*

*Kelda: www.vmf.fo & www.icex.fo*

## Faroe Petroleum hækkar eisini

Í takt við at ein komandi føroysk oljuvinna tykist alt meira sannlík, er kursurin á partabrøvunum hjá hinum føroyska oljufelagnum, Faroe Petroleum eisini farin at hækka.

Her hevur kursfallið annars verið hampuliga stórt síðani í summar. Einamest, tí kursirnir í summar í ovurstóran mun vóru ávirkaðir av ógvusliga trýstinum, sum kom á oljuprísirnar eftir stóru tropisku ódnirnar.

Við at fáa part í leitiloyvunum við Føroyar, hevur Faroe Petroleum tó gjørt eitt fitt lop uppeftir. At týðandi fund um sama mundið eru gjørd heilt nær føroyska markinum ger sjálvandi eisini sítt til, at vónirnar um eitt týðandi fund í Føroyum eru enn størri.



*Sveiggini í kursivirðinum hjá Faroe Petroleum hava verið hampuliga stór seinasta hálva árið, sum tað eisini framgongur av talvuni*



*Athena er risastórur trolari. Hann er yvir 100 metrar langur og hevur koyggjupláss til 150 mans*

# Keypa risastóran trolara til Føroyar

**Eitt felag í Hósvík hevur keypt ein stóran frystitrolara, sum skal fiska undir Afrika**

**NÝMENNING**
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Hósvíkingar ganga enn einaferð nýggjar leiðir.

Nú hevur eitt felag í Hòsvík keypt ein risastóran frystitrolara úr Suðurkorea. Felagið, sum eigur skipið er Ocean Group Faroes og skipið hevur fingið navnið Athena.

Tað eru feløg í Føroyum og og einstaklingar í Føroyum og íslandi, sum hava stovnað felagið og úr Hósvík eru Joensen-mennnir í Thor nakrir av eigarunum.

Annars fær skipið heimstað í Sandavági.

Og tað er ikki av tilvild, tí skipari á fyrsta túrinum verður Elias Christophersen úr Sandavági, sum eisini er ein av partaeigarunum.

Annars er ølll fíggingin fingin til vega í Føroyum. Tað eru Realkreditturin, Føroya Sparikassa og Ìløgufelagið, Royndin, sum hava fíggjað verkætlanina og tilsamans er verkætlanin slakar 140 mill kronur.

Athena er sera stórt skip. Tað er smíðað í Spania í 1992. Tað er 105 metrar langt, 20 metrar breitt. Annars hevur hon heilar 8050 Hestakreftir í maskinrúminum og hon lastar 2800 tons av frystum fiski. Frystiorkan er góð 220 tons um døgnið.

Athena brúka tungolju til høvuðsmotorarnar og vanliga gassolja til ljósmotoranar.

Skipið hevur koyggjupláss til 150 fólk, men eini 100 mans skulu verða við og yvirmenninir vera føroyingar og íslendingar

Eigararnir siga, at nú skal Athena til umvælingar í Singapore og Spania.

Men Um hálvan mars, fer skipið til fiskiskap og tað verður undir Vesturafrika, har ætlanin er at fiska rossamakrel og annan uppisjóvar við flótitroli.

## Bankin flytir vinnulívsdeildina

Mánadagin vórðu seinastu brikkarnir í bygnaðarbroytingunum hjá Føroya Banka staðfestar. Broytingar, sum millum annað høvdu við sær, at Súni Schwartz Jacobsen verður settur sum nýggjur stjóri við ábyrgd av vinnulívsdeildini.

Nú er so eisini greitt, at vinnulívsdeildin í framtíðini verður enn meira skild frá privatkundadeildini.

Føroya Banki hevur sent út tíðindaskriv, har tað verður staðfest, at vinnuøkið nú verður savnað í bygninginum í Húsagøtu (við SMS).

- Hetta hava vit valt, tí vit halda, at við bert at hava eitt vinnuumhvørvi, kann bankin veita eina enn betri tænastu enn áður, verður staðfest í skrivinum, sum bankin hevur sent.

**-mørk**

## Kanna kapping á fíggjarmarknaðinum

Tá norðurlendsku kappingarmyndugleikarnir í heyst høvu fund í Føroyum, var ein av semjunum, at ein arbeiðsbólkur skuldi setast at kanna norðurlendska fíggjarmarknaðin.

Í hesum sambandi er Kappingarráðið nú farið undir at kanna føroyska marknaðin, og eru tað í fyrsta lagi tríggir spurningar, sum skulu svarast.

Marknaðarforðingar hjá nýggjum aktørum skulu lýsast - serliga við atliti til at fáa atgongd til at veita tænastur í hinum norðanlondunum.

Møguleikarnir hjá nýggjum peningastovnum at fáa atgongd til kervið hjá føroysku stovnunum skal kannast.

Og at enda skal kannast eftir, hví viðskiftafólk hjá peningastovnunum so sjáldan skifta veitara.

**-mørk**




## Skarv letur upp aftur




Vælkenda føroyska ølstaðið SKARV í Keypmannhavn letur nú upp aftur aftan á trý ára steðg

Eigarin, Dánjal Petur Thorsteinsson, sigur, at nógv fólk ganga og spyrja eftir Skarv. Vit bjóða eitt meira tíðarhóskandi stað til allar føroyingar, og vit eru glað fyri at tæna føroyingum aftur. Móttøka verður fríggjakvøldið 6. januar, 13. kvøld, fyri øllum, og sum ein vælkomst letur Skarv ókeypis leskivørður millum kl. 20 og 22.

Seinastu árini hevur staðið verið opið fyri ungum danun, men tað bar ikki frukt, og føroyinga millum verður ofta spurt, hvar føroyingar hittast í vikuskiftinum í Keypmannahavn.

Ætlanin er fyribils at hava opið hvørt fríggjakvøld og leygarkvøld. Sjálvt um dansigólvið er flutt og nýggjur DJ pultur er smíðaður, so verður dentur lagdur á, at fólk kunna tosa saman.